**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1028**
**Tíðarskeið: 18-29/8 2010**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Lis Larsen, Rógvi Mouritsen, Kristian Zachariasen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Magakanningar skulu eisini gerast av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til m.a. aldursgreining av havtasku og svartkjafti skal eisini fáast til vega.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur. Hitamátari at seta á lemmarnar (Minilogg).

**Um túrin:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Hetta er 12. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. 138 trolstøðir vórðu tiknar á tí fyrra túrinum, so til hendan túrin vóru 62 trolstøðir eftir; tær lógu yvirhøvur vestan- og sunnanfyri.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

Farið varð av Havnini um midnáttarleitið tann 19/8, og kastað varð fyrstu ferð tíðliga um morgunin tann 20/8 eystan fyri Húsavík (øki II, puntur 13); hetta er ein eyka støð í staðin fyri punt 7 í sama øki í Sandshavinum, ið eisini varð tikin í fjør. Seinnapartin 25/8 var seinasta støðin á túrinum tikin, og so varð siglt á Havnina at seta fólk av og so inn á Toftir at landa morgunin eftir. Tá tað var liðugt, varð siglt á Havnina, har vit komu stutt áðrenn middag tann 26/8, og yvirlitstrolingin á sumri 2010 var við hesum at enda komin.
Túrurin sum so gekst væl, og tað eydnaðist at taka allar tær ætlaðu 62 støðirnar. Tó var tað fast/skrætt 8 ferðir; hesar støðirnar máttu sostatt takast umaftur. Eitt yvirlit yvir allar støðir á yvirlitstrolingunum á sumri er í túrætlanini fyri hendan túrin (1028) og á Mynd 1.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 1028

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 358 | 95 | 348 | 76 | 388 | 58 | 50 | 27 |

Tal á nytraðum fiski tilsamans: 1171
Tal á magum tilsamans: 229

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miðað verður eftir, at túrurin er klárur at leggja í basu í november.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrinum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Í talvu 2 er tó eitt yvirlit yvir øll sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum, hvussu nógv varð fingið av hvørjum slagi, og á hvussu nógvum støðum tey vórðu fingin. Mest varð fingið av hvítingsbróður, og síðani komu upsi, hýsa, toskur, gullaksur og lítli kongafiskur. 47 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt høgguslokk (agnhøgguslokkur, mathøgguslokkur og Eledone (8-armar)), hummara, rækju, Jákupsskel og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Um hugt verður at, hvussu títtleikin er av teimum ymsu sløgunum, t.e. á hvussu nógvum støðum, tey koma fyri, so varð lítli kongafiskur fingin á 90% av teimum 62 støðunum. Síðani koma m.a. toskur (89%), upsi (87%), hvítingsbróðir (84%), longa (79%) og hýsa (77%).
Verða báðir túrarnir á sumri lagdir saman, só vórðu 60 fiskasløg veidd tilsamans umframt hummara, rækju, Jákupsskel, skrambul og 3 sløg av høgguslokki; hetta er nakað fleiri enn vanligt. Mest varð fingið av hýsu, og síðani koma hvítingsbróðir, upsi, toskur, lítli kongafiskur og gullaksur. Upsi varð fingin á 90% av støðunum, toskur og hvítingsbróðir á 87%, lítli kongafiskur á 82%, hýsa á 76% og longa á 72% av støðunum.

Við at bera saman við stovnsmetingarnar, ið verða gjørdar á hvørjum ári, og við veiðutøl hjá fiskiflotanum (veiða upp á roynd), er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar eru fyri, m.a. upsi. Á mynd 2 er

veiðan pr. støð av úrvaldum sløgum frá báðum túrunum í summar víst samanborið við túrarnar á sumri undanfarin ár.
Fyri tosk hevur lítið verið at fingið síðani 2003, og serliga árini 2006-2008 var lítið at fáa. Men í fjør bragdaði aftur, og úrslitið í ár var uppaftur betri. Hetta stuðlar upp undir framskrivingar, gjørdar í apríl-mai í ár, ið vístu, at toskastovnurin er í góðum vøkstri vegna betri fiskavøkstur og tilgongd; sera lítið varð tó fingið av 0- og 1-ára gomlum toski.
Úrslitini fyri hýsu hava verið støðugt minkandi síðani 2002, og úrslitið í fjør var tað minsta síðani 1991. Tað kvinkaðist nakað uppeftir í ár, men er enn á sera lítlum støði. Men eisini her eru batar at hóma, tí fiskavøksturin er batnaður, og tilgongdin, ið hevur verið sera lítil seinastu árini, tykist nú at vera betri aftur; serliga 2009-árgangurin tykist góður. Men lítið var av 2010 árganginum.
Hóast úrslit viðvíkjandi upsa frá tílíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, so benda tølini á, at stovnurin hesi seinastu 4 árini er nakað minni enn árini frammanundan. Stovnsmetingarnar í apríl-mai vístu, at upsastovnurin, hóast í minking, enn var væl fyri í 2009, og úrslitini frá yvirlitstrolingunum í summar benda á sama borðið. Avgerandi fyri gongdina næstu árini verður, hvussu tilgongdin fer at verða.
Longa og brosma tykjast at vera væl fyri, kanska eisini reyðsprøka, og tunga tykist í vøkstri aftur. Hvítingsbróðir er heilt væl fyri, meðan svartkjaftur hevur verið á sera lítlum støði seinastu 4 árini; positivt fyri svartkjaft er, at nøgdin av 0-ára gomlum fiski var munandi betri í ár enn árini frammanundan.
Nógv hevur verið tosað um makrel í seinastuni, og hóast yvirlitstrolingarnar verða gjørdar við einum lítlum botntroli, so sæst, at nøgdin av makreli er vaksin nógv síðani 2006, og tað serliga seinastu 2 árini. Eisini rossamakrelur er í vøkstri, og gullaksur tykist vera hampuliga væl fyri.

Magakanningar vístu, at fiskurin hevði nokk at eta, og sum heild var fiskurin væl í holdum. Kanska var støðan heldur verri enn í fjør, og tað vakti ans, at bert einstakar nebbasild vóru í magunum, og heilt lítið av hvítingsbróðuryngli.

Havstovan, 3. september 2010

*Jákup Reinert*

**Talva 2.** **Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á MH túri nr. 1028**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Veiða pr støð, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|---|
| Hvítingsbróðir | 6006.467 | 96.879 | 84 |
| Upsi | 5601.509 | 90.347 | 87 |
| Hýsa | 5353.980 | 86.355 | 77 |
| Toskur | 4374.393 | 70.555 | 89 |
| Gulllaksur | 3752.220 | 60.520 | 47 |
| Lítli kongafiskur | 3695.019 | 59.597 | 90 |
| Svartkjaftur | 1169.788 | 18.868 | 66 |
| Havmús | 1073.818 | 17.320 | 18 |
| Longa | 1047.224 | 16.891 | 79 |
| Rossamakrelur | 987.638 | 15.930 | 42 |
| Hvítingur | 549.801 | 8.868 | 27 |
| Skrambul | 377.855 | 6.094 | 90 |
| Silvurmurtur | 354.839 | 5.723 | 27 |
| Trantkongafiskur | 298.327 | 4.812 | 11 |
| Makrelur | 290.400 | 4.684 | 35 |
| Knurrhani | 279.699 | 4.511 | 40 |
| Tunga | 276.236 | 4.455 | 69 |
| Brosma | 263.061 | 4.243 | 50 |
| Stóri kongafiskur | 239.695 | 3.866 | 40 |
| Havtaska | 193.585 | 3.122 | 35 |
| Lálla | 161.089 | 2.598 | 18 |
| Blálonga | 154.644 | 2.494 | 15 |
| Glaskvoysa | 154.419 | 2.491 | 24 |
| Reyðsprøka | 118.058 | 1.904 | 32 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 81.202 | 1.310 | 26 |
| Agnhøgguslokkur | 70.659 | 1.140 | 32 |
| Sandsprøka | 69.726 | 1.125 | 27 |
| Svartkalvi | 63.440 | 1.023 | 3 |
| Lítla brosma | 54.235 | 0.875 | 8 |
| Kalvi | 51.235 | 0.826 | 8 |
| Mathøgguslokkur | 34.794 | 0.561 | 13 |
| Halahvassa skøta | 33.970 | 0.548 | 3 |
| Kjaftsvarti hávur | 27.832 | 0.449 | 6 |
| Hvassasprek | 20.303 | 0.327 | 24 |
| Tindaskøta | 20.271 | 0.327 | 11 |
| Skøta | 17.080 | 0.275 | 2 |
| Blágómur | 10.655 | 0.172 | 2 |
| Hummari | 8.719 | 0.141 | 8 |
| Búksvarti hávur | 8.045 | 0.130 | 2 |
| Sild | 7.503 | 0.121 | 15 |
| Lýrur | 6.775 | 0.109 | 3 |
| Steinbítur | 4.700 | 0.076 | 6 |
| Eledone | 2.488 | 0.040 | 6 |
| Streymsild | 2.028 | 0.033 | 5 |
| Glýsufiskur | 1.095 | 0.018 | 3 |
| Lýsingur | 0.745 | 0.012 | 2 |
| Bláriddari | 0.738 | 0.012 | 2 |
| Reyði knurrhani | 0.545 | 0.009 | 2 |
| Murrikrutt | 0.455 | 0.007 | 5 |
| Mjái prikkafiskur | 0.399 | 0.006 | 2 |
| Blettuti floyfiskur | 0.307 | 0.005 | 2 |
| Grøna krutt | 0.270 | 0.004 | 2 |
| Lakstobis | 0.020 | 0.0003 | 2 |
| Lakssild | 0.013 | 0.0002 | 3 |

| Talva 3. | Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á sumri 2010. | | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Veiða pr støð, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Hýsa | 17620.933 | 88.105 | 76 |
| Hvítingsbróðir | 17115.813 | 85.579 | 87 |
| Upsi | 15285.323 | 76.427 | 90 |
| Toskur | 11902.282 | 59.511 | 87 |
| Lítli kongafiskur | 10175.778 | 50.879 | 82 |
| Gulllaksur | 8270.497 | 41.352 | 63 |
| Svartkjaftur | 5216.829 | 26.084 | 64 |
| Longa | 4405.169 | 22.026 | 72 |
| Hvítingur | 2131.598 | 10.658 | 41 |
| Stóri kongafiskur | 1869.072 | 9.345 | 42 |
| Rossamakrelur | 1725.210 | 8.626 | 32 |
| Tunga | 1646.275 | 8.231 | 62 |
| Havmús | 1251.230 | 6.256 | 8 |
| Brosma | 1200.318 | 6.002 | 57 |
| Trantkongafiskur | 1166.516 | 5.833 | 12 |
| Silvurmurtur | 1087.676 | 5.438 | 27 |
| Makrelur | 1071.663 | 5.358 | 35 |
| Skrambul | 883.957 | 4.420 | 90 |
| Blálonga | 651.341 | 3.257 | 20 |
| Svartkalvi | 635.628 | 3.178 | 5 |
| Knurrhani | 607.327 | 3.037 | 36 |
| Reyðsprøka | 439.804 | 2.199 | 29 |
| Havtaska | 421.333 | 2.107 | 28 |
| Sandsprøka | 208.000 | 1.040 | 25 |
| Lálla | 206.719 | 1.034 | 11 |
| Mathøgguslokkur | 203.387 | 1.017 | 19 |
| Glaskvoysa | 201.524 | 1.008 | 12 |
| Agnhøgguslokkur | 173.485 | 0.867 | 25 |
| Kalvi | 157.985 | 0.790 | 6 |
| Kjaftsvarti hávur | 150.754 | 0.754 | 5 |
| Tindaskøta | 144.091 | 0.720 | 11 |
| Lítlabrosma | 120.869 | 0.604 | 6 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 100.300 | 0.502 | 13 |
| Hvassasprek | 99.240 | 0.496 | 25 |
| Steinbítur | 59.945 | 0.300 | 11 |
| Skøta | 58.400 | 0.292 | 2 |
| Liri | 37.780 | 0.189 | 3 |
| Halahvassa skøta | 35.885 | 0.179 | 2 |
| Sild | 33.969 | 0.170 | 16 |
| Lýrur | 22.030 | 0.110 | 3 |
| Hvítaskøta | 10.710 | 0.054 | 1 |
| Blágómur | 10.655 | 0.053 | 1 |
| Hummari | 8.984 | 0.045 | 3 |
| Búksvarti hávur | 8.045 | 0.040 | 1 |
| Glýsufiskur | 6.679 | 0.033 | 3 |
| Eledone | 6.606 | 0.033 | 5 |
| Úlvfiskabróðir | 5.163 | 0.026 | 1 |
| Jákupsskel | 2.621 | 0.013 | 1 |
| Streymsild | 2.028 | 0.010 | 2 |
| Krøkilskrutt | 1.027 | 0.005 | 2 |
| Murrikrutt | 0.911 | 0.005 | 4 |
| Rognkelsi | 0.768 | 0.004 | 1 |
| Lýsingur | 0.745 | 0.004 | 1 |
| Bláriddari | 0.738 | 0.004 | 1 |
| Svartfiskur | 0.715 | 0.004 | 1 |
| Reyði knurrhani | 0.545 | 0.003 | 1 |
| Mjái prikkafiskur | 0.399 | 0.002 | 1 |
| Blettuti floyfiskur | 0.307 | 0.002 | 1 |
| Grønakrutt | 0.270 | 0.001 | 1 |
| Reyða hornabrosma | 0.241 | 0.001 | 1 |
| Lítla lakstobis | 0.179 | 0.001 | 1 |
| Rækja | 0.077 | 0.0004 | 1 |
| Lítli kryttlingur | 0.074 | 0.0004 | 1 |
| Nebbasild | 0.073 | 0.0004 | 1 |
| Íshavs brynjukrutt | 0.033 | 0.0002 | 1 |
| Lakstobis | 0.020 | 0.0001 | 1 |
| Lakssild | 0.013 | 0.0001 | 1 |




**Mynd 2**. Fyribils úrslit frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.




**<u>Mynd 2 (framhald)</u>**. Fyribils úrslit frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.